Fyribilsstørv

# Frítíðaravloysarar Farmaleiðir

Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum til farmastøðir kring landi og til lastbilakoyring í summar, frá umleið fyrst í mai til seinast í september.

**Størvini fevna um**
Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá farmastøðfólkinum/ lastbilføraranum og frankeringsfólkinum, er at at vera við til:

- Farmaflutning og farmaavgreiðslu
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vegleiða og upplýsa kundar
- Frágreiðingarskyldu yvirfyri farmastøðleiðaranum

**Førleikakrøv**
*Umsøkjarar til farmastøðir og lastbilførara:*

- Koyriloyvi til lastbil/trailara
- Koyriloyvi til trukk/tugmaster
- Arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- Góð samskiftis- og samstarvsevni
- Álitandi og góðan røkjuskap

*Umsøkjarar til frankering:*
•Skrivstovuútbúgvin ella royndir innan skrivstovu
•Góð samskiftis- og samstarvsevni
•Álitandi og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2001.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Heina á Borg, farmaflutnings-leiðara.

Tlf. 343000 ella e-mail: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika. Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Aðalfundurin hjá P/F Kall

Í samband við aðalfundin hjá P/F Kall (skr. nr. 2868), sum lýstur er at vera tann 13.03.2001 kl. 16.00 í hølum felagsins á Óðinshædd 2 í Tórshavn, er hendan rætting til skrá fyri fundin. Í pkt. 7, har partapeningur felagsins verður hækkaður við millum 3-4 milliónir krónur í áljóðandi virði verður upphæddin rætta til 2-3,5 milliónir kr. í áljóðandi virði.

**Nevndin**

# Telefon- og avgreiðslutíðir

Telefon- og avgreiðslutíðirnar eru frá kl. 9.00 til kl. 13.00.

**Havnar Sjúkrakassi**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

# Heimarøktin í Norðoyggjum

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til Heimarøktina í Norðoyggjum, frá 15. mai til 30. september. Vit søkja avloysarar fyri sjúkrasystrar, heilsuhjálparar og heimahjálparar.

Heimarøktin fevnir um alla heimahjálp og heimasjukrarøkt í Norðoyggjum og eitt Eldrasambýli. Arbeitt verður frá kl. 18.00 til 23.00 úti og alt døgnið í Eldrasambýlinum. Arbeitt verður í skiftandi vaktum inni í Sambýlinum.

Av tí at ein av okkara heimasjúkrasystrum skal í farloyvi frá 1. apríl verður hennara starv leyst frá 1. apríl til 31. juli og møguleiki er at halda áfram, sum avloysari til 30. september.

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisatón verður at senda til økisleiðaran í Heimarøktini í Norðoyggjum, Bøgøta 34, 700- Klaksvík

Umsóknarfreist fyri summarfrítíðaravloysarum 2. apríl 2001.

Umsóknarfreist fyri farloyvi og avloysara 26. mars.

# Stuðul til gransking

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2001 er peningur settur av til granskingarverkætlanir. Hesin peningur kann eftir umsókn veitast sum granskingarfígging eftir tilmæli frá Granskingarráði Føroya.

Stuðul verður latin
1) føroyskum granskarum og granskaralesandi,
2) gransking á ella í tilknýti til føroyskar granskingarstovnar og
3) gransking, ið verður mett at hava týdning í føroyskum høpi.

Stuðul kann latast til ymiskar verkætlanir: ph.d.-verkætlanir og aðrar verkætlanir, ið ganga um fleiri ár ella smærri verkætlanir við stytri tíðarætlan. Fígging kann latast bæði einstøkum granskarum ella samstarvsætlanum millum fleiri granskarar. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari fær stuðul aðrastaðni eisini. Gjørt verður vart við, at peningur ikki kann játtast um fleiri fíggjarár. Fyri verkætlanir, ið vara meira enn eitt fíggjarár, má søkjast aftur á hvørjum ári eftir serligari mannagongd, hóast tilmælið er galdandi fyri alla granskingartíðina.

Umsóknir skula skrivast á serligt oyðublað, ið saman við skrivligari vegleiðing fæst á skrivstovu ráðsins og á heimasíðuni www.sleipnir.fo/gransking/ Til ber eisini at ringja ella skriva til skrivaran Anniku Sølvará, telefon 315302, teldupostur annikas@setur.fo

Umsóknarfreist er 2. apríl 2001

**Granskingarráð Føroya**
J.C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2064, **Sp/f Frá 26.04.1990, 100 Tórshavn.**

**Viðtøkur broyttar:** 30.12.2000.
**Roknskaparár:** 01.01.-31.12.
**Umleggingarár:** 01.05.2000-31.12.2000

Skráseting Føroya tann 7. marts 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2905, **Sp/f Total, 100 Tórshavn.**

**Viðtøkur broyttar:** 02.02.2001.
**Nýtt navn:** Sp/f Skálkur

Skráseting Føroya tann 6. marts 2001

Kristin Balle

---

# Borari

Søkt verður eftir royndur borara at koyra Roc 410 borivogn.

**Fa. Jón Kári Højgaard**
**Tlf. 217425 og 448452**



# Frá Føroya Psoriasisfelag

## Nýggj viðgerðarferð til Bláalónið í Íslandi verður frá 27.04. til 25.05.

Tey, ið hava tørv á viðgerð og ynskja at verða við á omanfyrinevndu viðgerðarferð, verða biðin um at fara til egnan kommunulækna at fylla út umsóknarblað. Umsóknarblaðið skal vera húðlæknanum í hendi í seinasta lagi 12.03. Kommunulæknin sendir umsóknarblaðið til húðlæknan. Húðlæknin viðger allar umsóknir og fáa umsøkjarar boð frá honum at møta til viðtalu.

**Føroya Psoriasisfelag**
Tlf. 424179

# Skrivstovufólk til posthúsini í Tórshavn/Argir

Søkt verður eftir skrivstovufólki at arbeiða á posthúsunum í Tórshavn/Argir. Arbeiðstíðin kann liggja millum 07.30 og 20.30. Møguleiki er fyri at arbeiða 1/2 tíð (20 tímar um vikuna).

Arbeitt verður mánadagar til fríggjadagar

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag

Umsóknir skulu sendast til:
Postverk Føroya
Avgreiðsluleiðarin, Óðinghædd 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreist 18. mars 2001

Nærri fæst at vita má.-fr. á tlf. 315562
Lokal 138 (beinleiðis tlf.)

Postverk Føroya

# Bilur við skaða til sølu

**Ein Ford Focus 1.6, 5 hurðar.**

Bilurin hevur skaða framman og verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur við skaða.

Skrásettur fyrstu ferð 30.11.2000.
Koyrt 3.500 km.

REYNI-SERVICE

**tlf. 313040 · lokal 20-27**

Fyribilsstørv

# Frítíðaravloysarar

## Bygdaleiðir/Oyggjaleiðir

Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum til busskoyring á Bygdaleiðum og at avloysa umborð á strandfaraskipunum í summar, frá umleið fyrst í mai til seinast í september.

**Uppgávurnar hjá bussføraranum**

- Koyra fastar rutur og leigutúrar
- Innkrevjing av ferðaseðlum og kassa av rokning
- Veita upplýsing til tey ferðandi í bussi num
- Lasta viðføri hjá ferðandi
- Avgreiða smápakkar við bussinum
- Undir koyring verða við til at tryggja samskipan við aðrar bussar og skip/ferjur
- Tryggja at allar flutningsreglur verða hildnar
- Tryggja reinføri av bussinum, innan og uttan
- Hava eftirlit við, at bussurin er í trygg- um mekaniskum standi
- Verða við til at tilrættaleggja størri og smærri viðlíkahaldsarbeiðir
- Saman við dagligu leiðsluni virka fyri betringum í tænastuni

**Førleikakrøv**

- Koyrikort til buss
- Royndir innan busskoyring og kollektiva ferðslu
- Heilsuváttan
- Skeið innan kundatænastu og koyri teknik er ein fyrimunur
- Kunnleika til ferðslulógina
- Kunna orða seg á norðurlendskum og enskum máli
- Arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- Góð samskiftis- og samstarvsevni
- Álitandi og góðan røkjuskap

**Uppgávurnar hjá sjófólki**
Skipari og manning á strandfaraskipunum skal tilrættaleggja ein effektivan dagligan rakstur, og tryggja, at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.
*Uppgávurnar fevna um:*

- Kundatænastu
- Trygdararbeiði umborð, í samsvari við altjóða krøv
- Lasting, í samsvari við altjóða krøv

- Uppsetan av mannagongdum fyri við líkahaldsarbeiði og dokking
- Samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

**Førleikakrøv**
*Umsøkjarar til stýrimann:*

- Vinnubræv sum stýrimaður
- Sjón- og hoyrnarroynd ikki eldri ennn 3 ár
- Prógv í GMDSS

*Umsøkjarar til maskinmeistara:*

- Vinnubræv sum skipsmaskinmeistari/ella maskinistur

*Umsøkjarar til dekkara:*

- Fulltikin matrósur
- Sjón- og hoyrnarroynd ikki eldri enn 3 ár

*Annars rokna vit við, at tú hevur:*

- Siglingarbók
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv ikki eldri enn 2 ár
- Roykkavari/sløkkileiðari ikki eldri enn 5 ár
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2001

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara
Tlf. 343000 ella e-mail: pah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika. Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg